gult26 cyan26 magenta26 svart26



# Sólin skein yvir norðuratlantiskar sangrøddir í Keypmannahavn

**Í døgunum 10.-13. mai var fimta Norðuratlantiska Kórstevnan í Danmørk hild-in, hesaferð í Keypmannahavn – mitt í øllum Grand Prix-hurlivasanum. Sum alt-ern-ativ til altjóða sangkappingina stóðu sangararnir úr útnorði avgjørt ikki aftanfyri, hvat viðvíkir sanggleðini, ið strálaði um kapp við vakra várveðrið. Luttakandi kórini og einstaklingar vóru úr Grønlandi, Íslandi og Føroyum. Tað eru føroysk kór í Danmark, ið fyriskipa hesum stevnunum. Hesa ferð var tað Húsakórið í Keypmannahavn, ið var vertur og fyriskipari av stevnuni**

Sjey kór og einstaklingar, 140 sangarar, 2 kórleiðarir og 4 tónleikarar luttóku á stevnuni. Norðuratlantiska Kórstevnan í Danmark er vorðin eitt afturvendandi tiltak á hvørjum ári, og í ár skipaði Húsakórið í Føroyahúsinum í Keypmannahavn fyri stevnuni. Kórstevnan varð hildin bæði í DGI-býnum, sum liggur við høvuðsjarnbreytarstøðina í Keypmannahavn og í høllini á Frederiksberg Rådhus. Í DGI-býnum varð vant, og har búðu fyrst og fremst langfarafólkini.

Fyrstu luttakararnir komu til Keypmannahavnar hóskvøldið 10. mai. Kórstevnan byrjaði fríggjamorgun 11. mai, har luttakararnir kundu velja seg inn á antin ein klassiskan ella ein rútmiskan sangbólk. Føroyski tónasmiðurin og kórleiðarin, Sunleif Rasmussen, tók sær av tí klassiska kórsanginum, og svenski professarin og kórleiðarin, Gunnar Eriksson, tók sær av tí meira rútmiska sanginum, har eisini improvisatiónin fekk ein stóran leiklut og ljóðføri spældu saman við sanginum.

Eitt nýtt kórverk var bílagt til stevnuna. Tveir ungir, føroyskir listamenn, Tróndur Bogason, tónasmiður, og yrkjarin, Niels Uni Dam, gjørdu verkið ðq. Tróndur Bogason, sum lesur á Det Kongelige Danske Musikkonservatorium, og Niels Uni Dam, sum lesur samskifti og heimspeki á RUC, leitaðu sær íblástur til verkið í fólki, mentan og náttúru í teimum trimum londunum í útnorði. Talan er um nýhugsan innan kórsang, og hetta er eitt sera áhugavert verk, sum á sín serstaka hátt knýtir eitt mentunarligt band ímillum londini í útnorði og Danmark.


*Gunnar Eriksson venur rútmiskan kórbólk*

Føroyahúsið á Vesterbrogade var karmurin um røkt av luttakarunum, og har vóru allar máltíðirnar serveraðar. Tað var ógvuliga væl fyriskipað, og Føroyahúsið eigur stóra tøkk uppiborna fyri hetta arbeiðið.

Kaffimunnarnir komu trillandi úr Føroyahúsinim oman í DGI-býin, har Georg og Bjarki í strálandi hýri skonktu uttandurakaffi til alt fólkið í støðgunum, sum vóru vælsignaðar sólskinsløtur.

## Konsertirnar

Fyrsta konsertin varðhildin fríggjakvøldið 11. mai í DGI-býnum, har tey 7 luttakandi kórini framførdu teirra egnu sangir: Grønlændertruppen MIK, Det islandske Kvindekor i København og føroysku kórini Álakórið (Ålborg), Gentubólkurin DRÓS, MPIRI og Húsakórið (Keypmannahavn) og Cantabile (Tórshavn). Fleiri av áhoyrarunum meintu, at ongantíð áður hevði dygdin verið á einum so høgum støði.

Onnur konsertin varð hildin leygardagin 12. mai í Frederiksberg Ráðhúsi. Her var serliga nógv gjørt burturúr karminum um konsertina.

Fyrst kom borgarstjórin í Frederiksberg Kommunu, Mads Lebech, mitt undir venjingini, pyntaður við borgarstjóraketuni, og ynskti øllum luttakarunum at vera hjartaliga vælkomin til ráðhúsið. Sum kvittan fyri røðu hansara sang Cantabile, sum var á konsertferð júst í hesum døgum og luttók á allari stevnuni, ógvuliga vakurt sangin: Tá ið teir sóu landið fyri borgarstjóranum.

Konsertin byrjaði við at sjónleikarin við Det kongelige Teater, Annika Johannessen, ógvuliga vakurt las upp eina tekst, hugkveikt úr verkinum hjá Trónda Bogasyni og Niels Una Dam.

Eisini var ein frásøgumaður, ið segði áhoyrarunum frá luttakarunum og innihaldinum í konsertini. Tað var Heini Davidsen, ið hevði hesa uppgávu, sum hann framdi uppá ein meistarligan hátt.

Konsertin var í trimum pørtum. Fyrst sang bólkurin hjá Gunnar Eriksson, har teir 4 tónleikararnir, Lisbeth Diers, percussion, Joakim Rolansson, altsax, Mats Eriksson, guitar og Thommy Andersson, k-bas, spældu til sermerktu improvisatiónirnar hja Gunnar Eriksson. Síðan sang bólkurin hjá Sunleif Rasmussen, og at enda frumframførdu allir luttakararnir á stevnuni nýggja verkið ðq, ið var sungið á føroyskum, íslendskum og grønlendskum, og harumframt við einari solorødd á donskum, sungið av kórleiðaranum fyri Íslendska Kvinnukórinum, Sigga Eyþórsdóttir.

Konsertin var eitt stórt upplivilsi fyri áhoyrarnar.

Kórstevnan endaði við einari megnar veitslu, sum varð hildin í Føroyahúsinum. Vit takka øllum luttakarunum fyri at vera við til at skapa eina stórfingna stevnu!

**Nevndin fyri Húsakórinum**

---

Arkiv Rediger Vis Meddelelse Format Funktioner Vindue Help 10:30 Outlook Express

Frá: Árni Gregersen, arnigreg@post10.tele.dk

**TELDUBRÆVIÐ**

Dagur 31.05.01

Til: eirikur@sosialurin.fo

Evni: Vikuskifti

# Útbrunnin starvsfólk

Seinastu mongu árini er livifóturin hækkaður munandi í Vesturheiminum. Vit hava tað betri – vit gera minni hart, fysiskt arbeið og sáttmálabundna arbeiðstíðin gerst styttri og styttri.

Í manga mátar hevur hetta verið mett sum stór framgongd. Vit hava meira pening at keypa fyri, og vit hava longri frí. Hetta er alt samalt rættindi, sum fakfeløgini hava skaffað limum sínum, sum ein part av teimum størri virðum, sum eru skapt i samfeløgunum.

Leingi hava vit øll fegnast um hesa gongd, men nú eru tað alt fleiri sum gera vart við, at alt ikki er so ljósareytt.

Mest nýttu orðini í nýggja kjakinum eru útbrunnin starvsfólk.

Fleiri fakfeløg vísa á, at hjólini nú snurra so skjótt, at fólk ikki megna at fylgja við. Krøvini frá arbeiðsplássunum um effiktivitet, málsetningar sum skulu uppfyllast og so framvegis, eru ov krevjandi. Menniskjan orkar ikki at fylgja við.

Seinastu søgurnar her í Danmark eru um fólk, sum arbeið í donsku kommunum. Har eru krøvini tils tarvsfólkini so strong, at alt fleiri geva upp fyri tapt. Tey verða fyrst sjúkrameldað og síðan siga tey upp – ella verða uppsøgd.

Sum altíð her í landinum eru tað mong, sum eru til reiðar at koma við frágreiðingum um, hví alt hetta hendir. Flestu siga, tá ið tað snýr seg um almenn starvsfólk, at nýggj krøv um betri tænastu, málsetningar, tíðarfreistir v. m. eru sett í verk, uttan at tað almenna hevur sett fólk og pening av til at uppfylla hesi krøv.

Fleiri fakfeløg í Danmark: HK, Forbundet af Offentligt Ansatte, Teknisk Landsforbund og onnur siga, at arbeiðsumhvørvið er vorðið ov hart. Starvsfólk líða av strongd, og hevur ein fyrst fingið hesa sjúku í longri tíð, so er næsta stig, at tey eru útbrunnin.

Og eru fólk fyrst komin í hesa støðu, so tekur tað langa tíð at koma fyri seg aftur. Ofta skifta fólk arbeiðspláss fyri at heilt at byrja av nýggjum.

Orðaskifti um viðurskiftini hjá almennum starvsfólki er frammi júst nú, men sama fyribrigdið hevur rakt privata arbeiðsmarknaðin fyri tíð síðani. Fyrst og fremt eru tað fólk, sum hava arbeitt innan KT-vinnuna hava gramt seg um at vera útbrunnin. Tað sum kanska er enn meira óhugnaligt er, at í hesi vinnu rakar fyribrigdið oftast heilt ung fólk.

Júst nú eru fleiri og fleiri, sum halda, at vit eiga at hugsa um at umskipa arbeiðsmarknaðin.,

Tað nyttar ikki bert at renna skjótari og skjótari, og arbeiða styttri og styttri. Tað kann væl vera, at vit duga at vera effektiv, men vit hava eisini tørv á at steðga á – uttan at vit kortini onki gera.

Við oljuvinnuni í huga, og vitandi um, hvussu skjótt hjólini snurra í Føroyum, fær tað meg at hugsa um lívið á bygd í Føroyum. Tað kann gott vera, at bilarnir ofta eru smærri, og onkur ikki hevur parabol.

Hinvegin hava tey kanska lívskvalitet.

Tey eru ikki útbrunnin.

Árni Gregersen
Bornholm

gult27 cyan27 magenta27 svart27



T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Forskúlin í Sankta Frans skúla søkir eftir barnsburðaravloysara

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir barnsburðarvikari til forskúlaflokk í Sankta Frans skúla at byrja eftir summarfrítíðina.

Arbeiðstíðin er parttíð, og er lønin eftir galdandi sáttmála.

Í forskúlanum eru 44 børn í tveimum flokkum, og starvast fýra fólk í forskúlanum.

Meira fæst at vita um starvið frá skúlastjóranum, Selmar Jacobsen, tlf. 31 21 47, ella frá Janus Isfeldt, lønarfulltrúa, tlf. 31 51 60.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 18. juni 2001. Viðmerk umsóknina "Sankta Frans skúli".

S N A R S K I V A N

## Pedagogar til Dagstovnin á Oyri

Søkt verður eftir 2 pedagogum til vøggustovuna. Eitt starv er 30, møguliga 40, tímar viku, at byrja 6. august, og eitt starv er 30 tímar viku fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi, at byrja 6. august og fyribils til 1. mai 2002.

Dagstovnurin er normeraður til 40 børn, sum er uppdeild í 3 bólkar:

**Stórustova** **16 børn 4–7 ár**
**Innistova** **10 børn 3–4 ár**
**Vøggustovan** **14 børn 0–3 ár**

Vit eru í náttúruvinarligum umhvørvi við haga og fjøru og leggja stóran dent á at nýta hetta í gerandisdegnum.

Størvini verða fyribils lønt sambært sáttmála ímillum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri í 11/13 lønarflokki.

Umsóknir við prógvi og møguligum viðmælum skulu vera stovninum í hendi í seinasta lagi 22. juni 2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran Rosu Prestá, ella varaleiðaran Sólrún Dam, á tlf. 422552.

**Dagstovnurin á Oyri**
450 Oyri
tlf. 422552 - fax 422632

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Lærarar

Tórshavnar skúlaráð søkir eftir lærarum til kommunalu skúlarnar í Tórshavnar kommunu skúlaárið 2001/2002.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2001/2002, verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

**Til Kalbaks skúla**
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna
1 lærara at undirvísa 20 tímar um vikuna

**Til Argja skúla**
6 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna

**Til Venjingarskúlan**
4 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna

**Til Kommunuskúlan**
1 lærara at undirvísa 26,5 tímar um vikuna og
2 lærarar vegna lærarar í barnsburðarfarloyvi

**Til Sankta Frans skúla**
2 lærarar at undirvísa 24 tímar um vikuna og
2 lærarar vegna lærarar í barnsburðarfarloyvi

**Til Eysturskúlan**
10 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna

**Til Hoyvíkar skúla**
3 lærarar at undirvísa 26,5 tímar um vikuna og
1 lærara vegna lærara í barnsburðarfarloyvi

**Meir fæst at vita**
um størvini frá skúlastjórunum ella Tórshavnar skúlaráði, Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60

**Umsóknir**
til størvini skulu verða Tórshavnar skúlaráð, postrúm 32, 110 Tórshavn, **í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. juni 2001**. Við umsókini eiga verða løgd ljóstøk av próvbrævi og møguligum viðmæli.

**Tórshavnar skúlaráð**
**Mentamáladeildin**

S N A R S K I V A N

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

## Pedagogur

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogi til frítíðarskúlan í Hornabø.

**Starvið**
Talan er um eitt pedagogstarv, 20 tímar um vikuna, har arbeitt verður seinnapart.

**Stovnslýsing**
Á frítíðarskúlanum í Hornabø ganga 40 børn. Karmarnir eru góðir til mennandi virksemi bæði innan og uttandura.

Økið rundan um er barnavinarligt og møguleikarnir til virksemi úti í náttúruni eru fjølbroyttir.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv, har umsøkjarin fær møguleika, at virka í einum umhvørvi, sum er í støðugari menning.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin
- hevur hug og áræði at skapa ein fjøllbroyttan og tryggan dag við virðing fyri tí einstaka barninum
- er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt
- er áhugaður í uttandura virksemi, har veðrið ikki er ein forðing
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar, foreldur og skúlan
- er við til at menna tað pedagogiska virksemi

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 6. august 2001. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Ann-Elisabeth Joensen, leiðara, tlf. 31 44 67, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Frítíðarskúlanum í Hornabø, Hornagøta 13, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 20. juni 2001.

S N A R S K I V A N

# Sosialurin

*Lesið Sosialin - tað loysir seg*